## Dýrar uppsagnir

Tað kostaði Matrikulstovuni meiri 600.000 krónur, at trý starvsfólk skuldu sigast úr starvi, men stovnurin skal tó ikki rinda meiri enn 450.000 krónur, tí Almannastovan rindar ein part av lønini hjá tí eina starvsfólkinum. Tey trý, sum skuldu sigast upp, vóru frá arbeiði í 14 mánaðir, men eitt teirra fekk annað arbeiði. Í síðsta mánað gjørdi innlendismálaráðið av, at starvsfólkini á Matrikulstovuni skuldu ikki missa arbeiðið kortini.

## Ikki á veg út

Í sambandi við tosið um Búskaparskipan Landsins hevur verið nevnt, at ein stovnur sum Landsverk er á veg út úr skipanini. Men tað avsannar stjórin á Landsverki. Oyvindur Brimnes sigur við Útvarpið, at stovnurin fer ikki at gera sína egnu búskaparskipan. Hann sigur, at Landsverk hevur altíð ment sínar forskipanir til Búskaparskipan Landsins, og ay stovnurin hevur ongar ætlanir um at fara úr Búskaparskipanini.

# Halda fast við gomlu gøtunøvnini í Mykinesi

**- Hetta er eitt vala arbeiði, sigur borgarstjórin í Sørvági, Jákup Suni Lauritsen**

GØTUNØVN
*Snorri Brend*

*Mykines fær tey gomlu gøtunøvnini*



**Mykines:** Í farnu viku fekk bygdaráðið í Sørvági handað eitt álit um gøtunøvn í vestastu oyggj okkara.

Í eina tíð hevur ein nevnd arbeitt við spurninginum um, hvussu nýggju gøtunøvnini í Mykinesi skulu skipast í framtíðini.

Nevndin hevur viðgjørt hetta málið væl og virðiliga, og er í roynd og veru komin til eitt spennandi – og helst eisini sjálvsagt – úrslit:

- Tey gomlu nøvnini eiga framvegis at verða brúkt, sigur nevndin í áliti sínum.

Málið skal nú viðgerast víðari innan umsitingina í Sørvágs kommunu, sum Mykines er partur av.

### Skilamenn

Nevndin sum hevur viðgjørt gøtunøvnini í Mykinesi hevur verið mannað við góðum og staðkendum fólki.

Formaður í nevndini var Steingrím Abrahamsen, og annars vóru teir báðir Jákup í Løðu og Oskar Joensen í nevndini.

Teir tríggir mæla m.a. til, at brúka nøkur av gomlu staðarnøvnunum í bygdini – á Túala, á Bø og Handan á.

Uppskotið hjá nevndini hevur millum annað verið til hoyringar hjá fólki í Mykinesi.

Ein hevur somuleiðis tryggjað sær at nøvnini eru málsliga røtt, og tí hava fólk hjá Fróðskaparsetrinum eisini verið við í arbeiðinum.

Álitið um gøtunøvnini varð handað borgarstjóranum í farnu viku, og skal tað nú leggjast fyri bygdaráðið til endaliga góðkenning.

Sambært borgarstjóranum, Jákup Suna Lauritsen er ikki óhugsandi, at hetta hendir longu á fyrstkomandi fundi, sum verður í næstu viku.

- Eg kann bara staðfesta, at hetta er eitt vala arbeiði, sum hesir skilamenninir hava latið úr hondum, sigur hann í stuttari viðmerking.

# MáF-stevna við forumteatri

**Árliga MáF-stevnan verður á Føroya Fólkaháskúla í døgunum 9. til 11. mars.**

**- Endamálið er at fáa savnað so nógv sum gjørligt av teimum mongu, ið fáast við áhugaleik, at tosa og kjakast um tey viðurskifti, áhugaleikarar virka undir, sigur MáF. Forumteatur er eisini á skránni**

SJÓNLEIKUR
*Snorri Brend*

**Havn:** Forumteatur er ein serligur leikháttur, har ein við heilt stuttum leiki lýsir eina trupla og kanska provokerandi støðu, t.d. at onkur verður happaður á arbeiðsplássinum ella í skúlagarðinum.

Sami leikur verður spældur fleiri ferðir. Fyrstu ferð endar hann ikki væl. Næstu ferðina, leikurin verður spældur, kann áskoðarin blanda seg uppí við at broyta reaktiónina hjá teimum ymisku leikarunum, soleiðis at endin gerst positivari.

Forumteatur verður nógv brúkt, eitt nú í menningarlondum til tess at aktivera og upplýsa fólk um síni rættindi, ið er so alneyðugt í einum demokratiskum samfelag.

Tað var brasilski leikstjórin Augusto Boal, ið fann upp á forumteaturformin einaferð í sekstiárunum. Ein av forumteaturgreinunum er ósjónliga teatrið, ið er nógv útbreitt í londum sum Nepal, har stórur partur av fólkinum eru analfabetar og ikki kenna síni rættindi. Tað ósjónliga teatrið, ið verður spælt á gøtunum, virkar soleiðis, at áskoðarin veit ikki, at hetta er teatur, tá ið hann blandar seg uppí.

MáF-stevnan byrjar fríggjakvøldið 9. mars kl. 19. Eftir stutta hugnaløtu við drekkamunni og øðrum góðum, verður farið í gongd við forumteatur.

Tað eru Ung í MáF, sum skipa fyri.